gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Skattalætti til millióningar enn einaferð

Oddagrein

VIT hava áður skrivað undir hesi somu yvirskrift á hesum stað, men tá eingin raknaði við fara vit enn einaferð at tríva í málið við vón um, at eitt nú fíggjarmálaráðharrin og flokkur hansara geva svar uppá tiltalu. Karsten Hansen lovaði, tá hann fór í Tinganes, at hann skuldi sita fast á kassanum. Men samgonguskjalið sigur, at skattalætti skal veitast. Herfyri samtykti tingið at lækka partafelagsskattin úr 27 niður í 20%. Eingin lætti til vanliga løntakaran. Endamálið við lækkingini í partafelagsskattinum skuldi vera konsolidering av vinnulívinum og ein roynd at draga útlendskan kapital til Føroya. Fíggjarmálastýrið hevur neyvan hugsað um, at tað ber ikki til at lóggeva fyri konsolidering. Ein aðalfundur, ið er hægsti myndugleiki í einum partafelag, kann játta sær sjálvum (partaeigarunum) „konsolideringina“ út sum vinningbýti beinleiðis í egnan lumma. So er einki uppspart í felagnum, og við galdandi vinningsbýtisskatti (35%) verður samlaði skatturin (partafelagsskattur+vinningsbýtisskattur) 48%.

HETTA ER munandi lægri, enn tað marginalskattatrýst, ið flestu føroyskir løntakarar liva undir. Løntakarar í t.d. Vestmanna, Miðvági, Sandi, Tvøroyri, Vági og Skopun, og sum vinna meira enn 140.000 kr., liva við einum marginalskattatrýsti (tvs. skatturin av seinastu fortjentu krónuni) uppá 62,25%. Tvs. fyri at ráða yvir 1 krónu meira skulu teir forvinna nærum 3 kr. Hesi fólk fáa einki frá skattamálaráðharranum, men teir millióningar, ið hava sína ogn í partabrøvum, fáa nú eina óvanliga gávu frá landsstýrinum. Vinnuavkastið hjá partaeigarum verður nú skattað við 10-15% lægri enn hjá tí, ið skal stríðast fyri sína inntøku. Men tey, ið sleppa frá at stríðast fyri inntøkuna - partaeigaraavkast, rinda væl minni í skatt av sínum avkasti. Politikkur landsstýrisins er púra greiður: tey ríku skulu gerast ríkari, og løntakarin skal bløða.

TJÓÐVELDISFLOKKURIN situr á skattamálum. Í stevnuskrá floksins, vil flokkurin gera seg til verja teirra minni mentu. Men ein meira ultra borgarligan skattapolitikk hava vit ongantíð áður sæð her á landi. Fullveldismálið eigur so stóran part av flokspolitikkinum, at hann hevur gloymt, hvat hann áður stóð fyri. Samgongan lovaði skatalætta í samgonguskjalinum. Nú vita vit, at hann bert var ætlaður teimum vælbjargaðu. Tá talan hevur verið um at veitt vanliga løntakaranum skattalætta hevur fíggjarmálaráðharrin sagt, at búskapurin er ov heitur. Men tá lættast skal um skattin á kapitalíløgum er einki óført. At hetta eisini hitar búskapin kemur kanska ikki til hugs. Tað er sostatt bert skattatrýstið hjá vanliga løntakaranum, ið skal nýtast sum stýringsamboð í búskaparpolitikki landsstýrisins.

TJÓÐVELDISFLOKKURIN hevur áður átt veljarar millum arbeiðandi fólkið. Tað kundi verið verið áhugavert at vita, hvat hesin veljarin sigur til, at hann framhaldandi skal liva við tí høga skattatrýstinum frá búskaparkreppuni fyri at landsstýrið kann fíggja skattalættan hjá ríkmannastættini í Føroyum. Spurningur okkara til fíggjarmálaráðharran er: hví lækkar partafelagsskatturin samstundis sum persónsskatturin framvegir er óbroyttur? Teir flestu løntakarar hava ein marginalskatt uppá nærum 60%!!! Kann landsstýrið verja ein skattapolitikk har tey, ið fáa mest, gjalda minst?

Sosialurin

Viðmerking:

Útlendskur partapeningur í føroyskum vinnulívi

Føroyska vinnulívið hevur seinastu árini merkt, at ein støðug tilgongd av fremmandum kapitali hevur verið at fingið fatur á.

Serliga hevur verið frammi at útlendskur kapitalur floymir inn í okkara fiski- og alivinnu.

Tað er at fegnast um, at okkara vinnulív í dag er so tekkiligt, at útlendingar meta okkum sum eina skilagóða íløgu. Men vit eiga at vera varin, tá ið vit fara undir at selja av okkara náttúruríkidømi; vit selja her í veruleikanum rættin til okkara primeru vinnu. Vinnuna, sum eisini framyvir skal breyðføða flest allar føroyingar.

Vit eru noydd til at verja okkara mrimera vinnulív ímóti, at allur ognarrættur og harvið avgerðarrættur kemur at liggja hjá fremmandum spekulantum. Vit kunnu ikki framhaldandi standa á síðulinjuni og hyggja at ímeðan teir útlendsku spekulantarnir finna ymsar hættir at sleppa undan lógini og harvið sleppa at leggja fiski- og aliloyvir undir seg. Og við hjálp av m.a. skuldarbundnum føroyskum alifeløgum, megna teir at seta seg á avgerðarrættin hjá hesum feløgum.

Í dag sigur lóggávan á fiski- og alivinnuøkinum, at ikki er loyvt útlendingum at eiga meira enn 33% av virkjum innan fiska- ella alivinnuna. Hetta er eitt mark, sum landsins myndugleikar eiga at virða og styrkja, um so er, at lóggávan á økinum ikki er nóg greið.

Í Síðstu tingsetu kom eitt uppskot frá landsstýrismanninum í vinnumálum um at hækka partapeningin hjá útlendingum í alivinn-



uni upp til 49%. Sum umboð hjá Sjálvstýrisflokkinum í vinnunevndini, var undirritaði saman við andstøðuni við til at fella hetta uppskot frá landsstýrismanninum í vinnumálum og mælti til at markið framhaldandi kemur at verða 33%. Og tann meiningin stendur við.

Sjálvstýrisflokkurin ynskir at verja og tryggja at føroyskt vinnulív framhaldandi kemur at liggja á føroyskum hondum. Vit vilja tryggja, at tað eisini frameftir eru føroyingar, sum fyrst og fremst koma at eiga tær náttúrugávur, sum vit hava fingið tillutað. Tí eitt er sikkurt, og tað er, at selja vit alt okkara fiskiríkidømi, so er ikki nógv eftir hjá okkum føroyingum at liva av.

Til tess at føroyingar framhaldandi skulu kunna liva og hava umstøður og førleika at gera íløgur í okkara vinnulív, so fer Sjálvstýriflokkurin í komandi tingsetu at leggja serligan dent á at lóggávan á hesum økinum verður hildin og styrkt um neyðugt.

Vinarliga
Jákup Sverri Kass
sjálvstýrismaður

Nú melur alt í klingur

Spurningur til landsstýrismannin í almannamálum, frú Helena Dam á Neystabø og onnur.
Er tað satt, at almannastýrið hevur sett fólk í starv at samskipa ólóligheitir?

Í føroyskum tíðindablaði havi eg lisið, at landsstýrismaðurin í almannamálum hevur endurgivið juristar, ið siga, at heimild ikki finst at seta stuðlar og tí heldur ikki at rinda teimum løn.

Um so er, hví steðgaði tú ikki hesi framferð?

Hvussu nógv er goldið til stuðlar hesi síðstu 7 árini? Uppgivið ár fyri ár. Veit væl, at tú ikki hevur ábyrgdina



av øllum hesum árunum.

Hevur leiðarin hjá heimarøktini lóggevandi myndugleika?

Nakað seinri las eg lýsing í bløðunum og hon var frá leiðarinum hjá heimarøktini, har søkt verður eftir samskipara til stuðlarnar og nú veit hesin leiðari væl at siga tær og okkum øðrum, hvar heimildirnar til at seta og rinda stuðlum løn finst. Seinri hoyrdist í útvarpinum, at samskipari var settur. Tíðindi frá tær.

Ber tað til at venda øllum á høvdið við at áleggja einum undirsátta at seta lýsing í blaðið og ávísa heimildir, ið ikki eru til og annars látast sum alt er í lagi?

Til landsstýrismannin í fíggjarmálum, formannin í fíggjarnevndini og formannin í trivnaðarnevndini.
Hvat hugsaðu tit og hvat gjørdu tit, tá ið tit lósu og hoyrdu tað, ið nevnt er her? Tit hava eisini ábyrgdina av øllum milliónunum, ið eru goldnar uttan heimild í tykkara tíð. Um tit ikki hava hugsað nakað ella fyritikið tykkum nakað, so er høvið nú, áðrenn eykafíggjarlógin kemur til viðgerðar á ólavsøku.

Vinarliga
Poul Johs. Johansen
sosialráðgevari

Opportunisturin Jógvan á Lakjuni

Datt niður á eitt Dagblað, sum eg annars sjáldan síggi.

Í hesum tannleysa blað, sum Fólkaflokkurin eigur, skuldsetir Jógvna á Lakjuni andsøtðuna fyri at liva av donskum pengum!

Hevur nakar hoyrt so grovan frekleika?

Hesin tingmaður livur sjálvur av donskum pengum, og hann hevur ikki rætt hond frá síðu við uppskoti um at yvirtaka skúlaverkið og fyri at bøta um sína ringu samvitsku, gevur hann andstøðuflokkunum skuldina fyri, at hann livir av donskum pengum.

Harra Jógvan á Lakjuni, tú veit hvør kom við tí blokki, sum tú nú livir av. Tað gjørdi tín flokkur saman við øðrum loysingaflokkum. Sambandsflokkurin eigur ikki eitt klovið oyra í tínum olmussu blokki.

Men gloym nú ikki at greiða frá at tit bara gjørdu hálvar yvirtøkur, tá tit komu við blokkinum, tit vildu valda og bóðu danir gjalda.

Slík gerð vísir, at tit als onga ábyrgd vilja hava.

Í hesum ússaliga Dagblað skrivar Jógvan á Lakjuni m.a.: »Vit hava bara eitt ynski um at taka ábyrgdina av okkara egna landi og hava biðið danir um eina rímiliga skiftistíð til at minka peningaveitingina úr Danmark«.

Hví biða danir um nakað, sum er fullokomuliga óneyðugt? Veit hesin opportunisturin ikki, at hann og hansara flokkur hava havt allar møguleikar at minka um blokkstuðulin í 50 ár?

Nei harra Jógvan á Lakjuni, tit vilja als ikki hava ábyrgdina av okkara góða landi og tit hava heldur ikki biðið um nakra ábyrgd!!!

Tit hava bara tiggað um, at tit einsamallir skulu valda, har sum danir skulu gjalda. Eingin hevur misbrúkt blokkin, sum tú og tínir líkar. Tit vita, at tørvurin fyri at brúka blokkin so sum ætlað er skríggjandi stórur, men tit standa bara og gána, men sjálvur hevur tú klórað tín part av blokkinum niður í egnan lumma og restina av blokkinum seta tit nú í grunn, samstundis sum tit biðja danir um at gjalda tykkum 1,3 milliard um árið í 15-20 ár.

Sig mær, hava tit heilt mist alt vit og skil? Er eingin skomm skapt í tykkum? Nær ætla tit at vísa veruliga ábyrgd, sum tit hava meylað um í 50 ár?

Nær ætla tit sjálvir at gjalda, har tit seta krøv um at valda?

Sambandsflokkurin og nú loksins eisini Javnaðarflokkurin eru munin meira ábyrgdarfullir enn tú og tínir líkar. Teir vilja nevniliga fyrst gjalda, áðrenn teir seta krøv um rættin til at valda.

Tit aka á knøunum og tilbiðja eina lánta ábyrgd, meðan andstøðan vil hava eina veruliga ábyrgd við fullum gjaldi (uttan nakað lán) av okkara góða landi, og júst her liggur tann stóri munurin millum tykkum og teir stóru andstøðuflokkarnar.

Meinhard Andreasen

gult cyan magenta svart

Episcopus non grata

ÓYNSKTUR BISPUR. Tá i› minnisvar›in í Sy›radali í Kalsoynni ver›ur avdúka›ur vera prestarnir í Nor›uroyggjum in absentia. Sambært keldur í Sy›radali mómæla Niels Pauli og Hans Eiler, at bispur var› bi›in at koma vi›, á›renn teir bá›ir vór›u spurdir

HØGNI MOHR

Ein steinur kann elva til stórt høvu›br‡ggj.

Minnisvar›in í Sy›radali, sum fólk í Sy›radali fara at avdúka leygardagin, gjørdist óvænta› orsøk til, at glø›andi kirkjuklandri› kykna›i aftur.

Súrir prestar

Aftur hesafer› spæla teir bá›ir klaksvíksprestarnir, Niels Pauli Danielsen og Hans Eiler Hammer, t‡dningarmiklan leiklut í strí›num.

Sy›radalsfólk standa og yppa øksl og skilja líti› av tí, sum fer fram. Og tey flestu hava ongar vi›merkingar til máli›.

Upprunaliga vildi nevndin, i› hevur sta›i› fyri at fáa

Niels Pauli Danielsen sóknarprestur sigur, at hann ikki er bo›in til minnisvar›aavdúkingina í Sy›radali

minnisvar›an upp at standa, at prestarnir eisini skuldu vera vi›. Men ónevndar keldur í Sy›radali siga, at klaksvíksprestar eru súrir, tí nevndin hevur bjó›a› bispi, á›renn teir bá›ir prestarnir í Klaksvík vór›u bodnir!

Úrsliti› er, at bispur og Meinard Bjartalí›, prestur á Vi›arei›i, sum skal skipa fyri sangi á sta›num, einsamallir standa fyri klerikala ískoytinum leygardagin.

Ikki bi›in

Niels Pauli Danielsen sigur, at søgurnar úr Sy›radali eru ósannar, og at hann ikki er bi›in at koma vi›.

– Eingin hevur bi›i› okkum vera vi›. Og annars eri eg upptikin av barnadópi, sigur Niels Pauli Danielsen.

Hetta er sama undanførsla sum Hans Eiler Hammer n‡tti, tá i› 1.000 ára haldi› skuldi markerast í Havn 2. hvítusunnudag.

Niels Pauli Danielsen n‡tti høvi› í gjár at koma vi› eini áheitan á fjølmi›larnar.

– Nú mugu tit halda upp at tveita vi› runu. Royni› heldur og lyfti bla›i› eitt sindur upp. Eg havi altso onki útistandandi vi› bisp, vildi hann vera vi›.

Er kunna›ur

Fleiri umbo› fyri bygdarfólki› í Sy›radali siga, at Niels Pauli og Hans Eiler eru bodnir vi›. Tískil ber til at sta›festa, at annar parturin í málinum sigur ósatt.

Til tess at koma nærri sannleikanum, ringdi Sosialurin aftur til Niels Paula Danielsen at tráspyrja, um hann var bi›in ella ikki.

– Altso, vissi tey í Sy›radali hava bi›i› meg vera vi›, so mugu tey kunna leggja ta› alment fram, sigur Niels Pauli.



Hans Jacob Joensen er bispur í Føroyum, men klaksvíksprestarnir bá›ir eru sambært keldum í Sy›radali ikki so fegnir um, at hann er bo›in at víga minnisvar›an í bygdini

Beint á›renn telefonsamrø›an millum Sosialin og Niels Paula endar, vi›gongur Niels Pauli kortini, at hann er kunna›ur um minnisvar›aavdúkingina.

– Og eg havi í hesum sambandi skaffa› teimum nøvn til minnisvar›an, sigur klaksvíksprestur, sum framvegis heldur fast vi›, at hann ikki er bo›in vi›.

Hann fer at umhugsa, um hann skal fara vi›, ver›ur hann bo›in, men hann væntar at ta› ver›ur torført at flyta teir bá›ar dóparnar, i› hann skal fremja sama leygardag.

Vónsvikin bygdarfólk

Úr Sy›radali siga fólk, at tey hava lagt kortini á bor›i› og vátta› fyri prestunum í Klaksvík, at tey hava bi›i› bisp vera vi›, tá i› minnisvar›in ver›ur avdúka›ur. Sí›ani hava klaksvíksprestarnir bo›a› frá, at teir ikki koma vi›, og minnisvar›anevndin hevur fingi› eina orsøk frá teimum. Or›aljó›i› í hesi orsøk, vilja tey ikki endurgeva alment.

– Bæ›i bygdarfólk og onnur, i› hava tilkn‡ti til bygdina hava sta›i› saman um hesa stórhending. Og nú eru vit kedd um, at prestarnir ikki koma vi›, er einasta vi›merking, i› forkvinnan í minnisvar›anevndini, Paulina Eliasen, vil koma vi›.

At summi bygdarfólk ikki vilja hava Sy›radal settan í samband vi› kirkjuklandur tykist vera rættiliga greitt. Beint á›renn bla›i› fór til prentingar ringdi ein ónevnd kona úr Sy›radali og kom vi› eini beinlei›is áheitan:

– Vælsigna›ir, skrivi› ikki um prestarnar, seg›i hon stutt og greitt.

Minnast minnisvar›an

Avdúkingin av minnisvar›anum yvir vanlukkurakt er annars ein stórhending í lítlu bygdini, har eini 10 fólk búleikast fast. Hetta er samstundis ein serstøk kirkjulig hending í kirkjuleysu bygdini. Fyri fyrstu fer› ver›ur Føroya bispur, Hans Jacob Joensen, vi› at avdúka minnisvar›a.

– Eg fari at víga minnisvar›a og øki og eisini at halda eina talu. Vit fara hesa løtu at dvølja vi› teir serliga døpru dagarnar, tá i› nøkur ávís fólk fingu sína vátu grøv, sigur Hans Jacob Joensen, sum eins og Sy›radalsfólk undrast stórliga yvir, at teir bá›ir prestarnir eftir øllum at døma ikki vera vi›.

Lítil ivi tykist vera um, at fólk í Sy›radali eisini noy›ast at minnast aftur á spildurn‡ggja minnisvar›an, i› gjørdist eitt ítøkiligt tekin um kirkjuklandri› anno 2000.

team 85 · 31 65 11

Shetland Cruise 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag

Gisting á hotelli
úr einans ...
(í lágárstíð) 864,- fyri hvønn

Gisting á vallaraheimi
úr einans ...
(í lágárstíð) 691,- fyri hvønn

Privat gisting
úr einans ...
(í lágárstíð) 819,- fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo